Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Hammer, løgtingsmaður

Svarari: Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum

Evni: Umstøðurnar hjá barnakonum úr Suðuroynni

Spurningar:

1. Heldur landsstýrismaðurin, at umstøðurnar hjá barnakonum, sum koma úr Suðuroynni til Havnar at føða, eru nøktandi?
2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera nakað fyri at bøta um umstøðurnar?
3. Um so er, nær kunnu vit vænta batar á økinum?
4. Ætlar landsstýrismaðurin at arbeiða fyri, at pápar kunnu fáa endurgjald fyri mista inntøku, tá teir eisini vegna frástøðuna til meginøkið, missa fleiri vikur arbeiði í sambandi við barnsburð?

Viðmerkingar:
Føðideildin á Suðuroyar Sjúkrahúsi varð niðurløgd fyri nøkrum árum síðan, og síðan hava barnakonur úr Suðuroynni ferðast til Havnar í sambandi við barnsburð. Sum natúrligt er, ynskja flestu barnakonur at hava maka og børn við, og av tí at tað sjáldan ber til at siga við vissu, akkurát nær barnið verður føtt, er neyðugt at vera í Havn nakrar dagar áðrenn væntaða føðing - umframt dagarnar aftaná, at barnið er føtt. Tá føðideildin á Suðuroyar Sjúkrahúsi lat aftur, var ætlanin, at íbúðir skuldu gerast í einum bygningi hjá Landssjúkrahúsinum, har barnakonur og familjur teirra kundu vera í sambandi við barnsburð. Men hetta bleiv av ongum. Barnakonur úr Suðuroynni hava nú búleikast undir vánaligum umstøðum í fleiri ár, og hóast tað fleiri ferðir hevur verið víst á trupulleikan, so sær tað ikki út til, at nakað munagott hendir. Harafturat eru tað nógvir pápar, sum missa nógva inntøku, av tí at teir ikki fáa arbeitt teir dagarnar, sum teir mugu vera í Havn. Hetta rakar serliga hart tímaløntar pápar, og dømi eru um, at tímaløntir pápar hevur verið í Havn í upp til 8 vikur uttan rætt til nakað endurgjald fyri mista inntøku. Her eru suðuroyingar fyri stórum vanbýti í mun til foreldur í øðrum økjum í landinum.
Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 20. mai 2021

Bjarni Hammer